# Høgni Hoydal: Lítið sannlíkt at vit fáa ST upp í samráðingarnar

*Landsstýrið hevur nú vent sær til ST fyri at vita, hvussu ein ber seg at í eini støðu, sum hevur tikið seg upp í samráðingum við donsku stjórnini um fullveldið. Men Høgni Hoydal ásannar nú, at tað er ógvuliga lítið sannlíkt, at tað ber til at fáa ein triðja part upp í samráðingarnar*

ÁKI BERTHOLDSEN

–Tað fer neyvan at bera til at fáa ST upp í fullveldissamráðingarnar ímillum donsku stjórnina og landsstýrið.

Tað ásannar Høgni Hoydal, landsstýrismaður í fullveldismálum, nú.

Eftir tann triðja samráðingarfundin við donsku stjórnina tann 15. juni, har tað heldur ikki eydnaðist at fáa donsku stjórnina at vika seg í spurninginum um eina búskaparliga skiftistíð, bar landsstýrið upp á mál at fáa ein triðja part upp í samráðingarnar.

Danska stjórnin vísti hesum aftur. Men landsstýrið hevur kortini vent sær til ST at vita, hvussu ein ber seg at í eini støðu, sum hesari og, hvørjir møguleikar eru.

–Støðan er nevniliga tann, at danska stjórnin heilt einfalt vil ikki samráðast.

Hon vil hvørki tosa um áramálið og hon vil heldur ikki gera eitt felags grundarlag at meta skiftistíðina útfrá.

– Hetta vísir, at hon metir hetta sum eitt danskt mál burturav. Og tað vísir eisini, hvussu ójøvn samráðingarstøðan hjá pørtunum er og, hvussu óvirðiligari og mannminkandi støðu, føroyingar eru í, sigur Høgni Hoydal.

– Hetta vísir heilt einfalt, at so leingi, vit ikki hava fullveldið, hava vit bara tey rættindi, sum danska stjórnin er sinnað at lata okkum fáa, tí tey rættindi, sum tað ikki hóvar henni, at vit skulu fáa, tey noktar hon bara at tosa við okkum um.

Hann sigur, at Landsstýrið helt tað tí vera eitt hugskot at fáa ein triðja part upp í, fyri at fáa eina javnari samráðingarstøðu ímillum partarnar.

– Vit høvdu ætlað, at hesin triði parturin skuldi stuðla uppundir at fáa veruligar samráðingar ígongd ímillum partarnar um tey málini, sum partarnir ikki so frægt sum hava fingið tosað um enn.

– Hann kundi eisini verið við til at gjørt eitt óheft grundarlag til at avgreiða tann búskaparliga partin útfrá. Tvs, at hann kundi mett um, hvussu føroyski búskapurin er í løtuni, hvussu búskaparligu viðurskiftini eru ímillum Føroyar og Danmark, og sostatt kundi hann verið við til at lagt grundarlagið fyri einari búskaparligari uppgerð ímillum londini bæði.

–Men tað ein misskiljing, tá ið sagt verður, at Landsstýrið vil hava ein triðja part uppí fyri at fáa eina semju við donsku stjórnina um tann búskaparliga partin í samráðingunum.

– Einasta endamálið við at fáa ein triðja part uppí, er at fáa glið á sjálvar samráðingarnar. Hetta er eitt úrslit av teirri niðurstøðuni, sum vit órongiliga máttu koma til eftir tann seinasta samráðingarfundin, tí vit halda, at danska støðan er eitt greitt brot á tær avtalur, sum eru gjørdar í sambandi við samráðingarnar.

– Men tá ið danska stjórnin, sum hevur buktina og báðar endarnar, sigur nei, mugu vit ásanna, at tað er lítið sannlíkt at tað fer at eydnast at fáa ein triðja part uppí.

–Um danska stjórnin noktar, hava vit ongan møguleika at krevja, at ein triði partur skal koma uppí.

– So leingi, vit ikki eru eitt sjálvstøðugt land, hava vit ongan rætt. ST er ein samgonga ímillum sjálvstøðug lond og tað leggur seg ikki út í innanlands viðurskifti hjá limalondunum.

Høgni Hoydal sigur, at landsstýrið fer enn einaferð at heita á donsku stjórnini um at lata vit og skil ráða og at góðtaka, at ein triði partur kemur uppí.

–Hetta er ikki tí at vit vilja samanbera hesa støðuna í Føroyum við støðuna í teimum londum, sum vit vanliga seta í samband við uppílegging frá ST.

–Men vit halda, at hetta málið kann viðgerðast sum spurning um altjóða rætt og tí fara vit at royna einaferð enn, sigur Høgni Hoydal.



*Higartil standa fullveldissamráðingarnar í botni í avgerandi spurningum. Vit eru ikki sinnað at fara til Danmarkar til ein sjónleik afturat. Tí vilja vit hava næsta samráðingarfundin í Føroyum, sigur Høgni Hoydal*

### Næstu ferð í Føroyum

Annars sigur Høgni Hoydal, at landsstýrið ætlar sær at samráðast við donsku stjórnini til eitt ítøkiligt úrslit er komið burturúr.

Hann sigur, at tað er neyðugt fáa eitt ítøkiligt uppskot burturúr, sum fólkaatkvøða síðani skal vera um.

Hann veit enn ikki, nær hendan fólkaatkvøðan kann vera.

Upprunaliga var ætlanin, at hon skuldi vera í ár, men nú er mest sannlíkt, at hon ikki verður fyrrenn næsta ár.

Landsstýrismaðurin sigur, at tá ið samráðingarnar hava ført til eitt ítøkiligt úrslit er tað neyðugt at almenningurin og andstøðan á tingið fáa hóskiligt av tíð til at seta seg inn í uppskotið og at viðgera tað.

Hann heldur, at tríggir mánaðir kundi verið ein hóskiligt tíð frá tí at at eitt úrslit er komið á borðið, til fólkaatkvøðan kann vera.

Og tá ið næsti samráðingarfundurin ikki er avtalaður enn, er tað lítið, sum bendir á, at fólkaatkvøðan kann verða fyrrenn í hvussu so er eftir ársskiftið.

Landsstýrið arbeiðir nú við at avtala tann næsta samráðingarfundin við donsku stjórnina.

–Vit vilja hava tann næsta fundin í Føroyum, tí vit eru ikki sinnað at fara aftur til Danmarkar til ein sjónleik afturat.

– Vit vilja fegin hava, at fundurin verður sum skjótast. Men danski taktikkurin hevur týðiliga avdúkað, at teirra endamál er at draga samráðingarnar út, so enn er ilt at siga, nær fundurin kann vera.

–Men tað er ómetaliga óheppið, at vit standa so leingi í eini samráðingarstøðu, har vit ikki so frægt sum fáa sett hol á avgerðandi spurningar. Tað ger, at alt kemur at snúgva seg um pening og skiftistíð og at ov lítið kemur at snúgva seg um fyrimunirnar við einum føroyskum fullveldi, sigur Høgni Hoydal.

# Hava havt fyrireikandi fund um Vágatunnilin

*Ráðgevarin hjá P/F Vágatunlinum hevur mælt til fyrst at venda sær til NCC, sum hevði lægsta tilboðið, um at gera sjálvan undirsjóvartunnilin*

ÁKI BERTHOLDSEN

Tað eru nú ábendingar um, at tað verður byggisamtakið NCC Norge og NCC Danmark, sum fær arbeiðið at gera sjálvan tunnilin undir Vestmannasundi.

Hetta var eisini samtakið, sum hevði tað lægsta tilboðið.

OT Blindheim í Tróndheimi og Norconsult í Oslo, sum eru ráðgevarar hjá P/F Vágatunlinum, hava mælt til at samband fyrst verður tikið upp við NCC um at gera tunnilin.

Og nú hevur tann fyrsti fundurin verið ímillum NCC og Vágatunnilin.

Men Dávid Reinert Hansen, stjóri í P/F Vágatunlinum, leggur dent á, at hetta var ikki ein samráðingarfundur.

–Hetta var ein uppklárandi fundur. Ráðgevarar okkara halda, at NCC hevur eitt áhugavert tilboð og hevur mælt okkum til at taka upp samband við byggisamtakið fyrst, fyri at fáa fleiri upplýsingar um nøkur viðurskifti, sum vit hildu vera ógreið í tilboðnum hjá teimum.

– Hesar upplýsingarnar hava vit nú fingið og nú fara ráðgevarar okkara at viðgerða upplýsingarnar og so fara teir at gera okkum eitt tilmæli og tá verður støða tikin til, høvnn vit fara at samráðast um sjálvt arbeiðið við.

Fundur hevur ikki verið, og er ikki avtalaður við nakað annað av hinum trimum byggisamtøkunum, sum hava bjóðað uppá arbeiðið.

NCC bjóðaði sær til at gera ein 8,5 metrar breiðan tunnil fyri 142,3 milliónir og ein 10 metrar breiðan tunnil fyri 151,6 milliónir.

Annars høvdu tvey onnur byggisamtøk latið tilboð inn, sum lógu nakrar fáar milliónir hægri enn tilboðið hjá NCC.

Annað samtakið, Mika, Spesialkontrakt og J&K Petersen kunnu gera tann smalara tunnilin fyri 147 mió og tann breiðara fyri 157 milliónir. Og Højgaard & Schultz, Selmer Fureholmen og Veidekke kunnu gera tann smalara tunnilin fyri 153,6 mió. og tann breiðara fyri 164,8 mió.

Hinvegin er tað enn púra ógreitt, hvør fær arbeiðið at gera vegirnar í sambandi við tunnilin. Samráðingar hava verið við J&K Petersen, sum hevði næstlægsta tilboðið, men eftir at rumbul stóðst av, at samráðingar ikki vóru við Byggitek, sum hevði lægsta tilboð, bað landsstýrið Vágatunnilin tosað við Byggitek. Tann fundurin var fríggjadagin og aftaná tað kom eitt tíðindaskriv, sum er líka onkissigandi, sum tað er stutt. Har stendur at Vágatunnilin og Byggitek hava havt ein kunnandi og konstruktivan fund, at at misskiljingar eru ruddaðar av vegnum og at samband verður ímillum partarnar framyvir. Men leiðslan í Vágatunlinum vil ikki útgreina, um hetta merkir, at samráðingar nú verða við Byggitek, og um J&K Petersen eru settir til viks. Spurningurin er púra opin, og vit úttala ikki øðrvísi, enn vit gera í tíðindaskrivinum, sigur Dávid Reinert Hansen.





*Í kvøld fæst at vita, hvat vanligi føroyingurin heldur um seinastu gongdina í fullveldissamráðingunum við danir*

# Veljarakanning almannakunngjørd í kvøld

*Seinastu dagarnar hevur Fynd gjørt eina nýggja veljarakanning fyri Sjónvaprið og Sosialin í sambandi við gongdina í fullveldissamráðingunum*

JOHN JOHANNESSEN

Í kvøld fæst at vita, hvat vanliga føroyingurin heldur um ætlanina hjá landsstýrinum um at fáa ST upp í fullveldissamráðingarnar við donsku stjórnina.

Eisini fæst at vita, um vanligi føroyingurin heldur tað vera rætt av landsstýrinum at seta møguligt ríkidømi úr undirgrundini í veð fyri at leingja skiftistíðina, eins og landsstýrið gjørdi á seinasta samráðingarfundi.

Hetta eru nevniliga tveir av spurningunum í veljarakanningini, Fynd seinastu dagarnar hevur gjørt fyri Sjónvarpið og Sosialin.

### Skuldi vera mynd av fólkaatkvøðuni

Kanningin, sum verður almannakunngjørd í kvøld, er tann triðja veljarakanningin, Fynd hevur gjørt í sambandi við fullveldissamráðingarnar.

Fyrsta kanningin varð gjørd beint eftir, at samráðingarútspæl landsstýrisins var vorðið alment.

Onnur kanningin varð gjørd eftir fyrsta samráðingarfundin millum landsstýrið og donsku stjórnina, tá danska stjórnin skúgvaði størsta partin av føroyska sáttmálauppskotinum til viks.

Sambært Fynd var ætlanin, at triðja kanningin skuldi gerast tá samráðingarnar vóru lidnar, soleiðis, at kannigin vísti støðu føroyinga til endaliga úrslitið. Veljarakanningin skuldi sostætt geva eina mynd av, hvussu úrslitið av fólkaatkvøðuni í heyst fór at síggja út.

Men samráðingarnar hava higartil ikki gingist, eins og landsstýrið hevði ætlað. Tað stendur í botni millum landsstýrið og donsku stjórnina í spurninginum um búskaparligu skiftistíðina, og tí sýnist eingin møguleiki vera fyri, at fólkaatkvøða verður hildin um ein fullveldissáttmála í heyst.

### Rætt at gera kanning nú

Jógvan Mørkøre, ið samskipar arbeiðið hjá Fynd, heldur tað vera rætt at gera eina veljarakanning nú. Hann vísir á, at samráðingarnar fingu eina heilt aðra vend, enn væntað. Brádliga snúu samráðingarnar seg ikki longur um sjálvan fullveldisspurningin, men um longdina á skiftistíðini.

Harafturat vísir Jógvan Mørkøre á, at tað er áhugavert at fáa at vita, hvat fólk halda um, at landsstýrið á seinasta samráðingarfundi setti møguligar inntøkur frá einari komandi oljuvinnu í veð fyri at fáa longri skiftistíð.

Somuleiðis heldur hann tað vera áhugavert at fáa at vita, hvat fólk halda um ætlanirnar um at fáa ST upp í samráðingarnar.

### Studentar gera arbeiðið

Tá Fynd ger veljarakanningar, er vanligt, at skúlaflokkar taka sær av verkliga partinum av arbeiðinum. Hetta er at ringja til fólk, seta fram spurningarnar og skráseta svarini.

Hesaferð tekur ein studentaskúlaflokkur í Hoydølum sær av arbeiðinum, og hevur lærari teirra, Christian Ihlen, umsjón við, at alt fer rætt fram.

Mánadagin og týsdagin tókust næmingarnir við at ringja kring landið og seta fram spurningarnar. Dagurin í gjár fór við at skráseta svarini á teldu og rokna saman.

Veljarakanningin spyr, umframt áður nevndu spurningarnar, millum annað, hvønn flokk fólk høvdu valt, um val var í morgin, hvønn flokk fólk ynskja sín flokk at samstarva við, hvønn politikkara fólk helst høvdu sæð sum løgmann og um fólk taka undir við, at Føroyar verða skipaðar sum fullveldisríki, um tillagingartíðin verður fýra ár.



MADRID
2.995,-
LONDON
2.585,-
PARÍS
2.695,-
STOCKHOLM
2.790,-
ROM
2.990,-*
MALAGA
2.995,-*
Prísir úr:
2585,-

Galdandi frá 1. juli til 20. august.
Prísurin er fyri hvønn aftur og fram, um tvey ferðast saman, og verða burturi leygarnátt. Ferðaseðlarnir skulu bíleggjast eina viku áðrenn fráferð, børn -50%, smábørn -90%. Prísurin er eisini galdandi úr útheiminum til Føroya.
Ferðaavgjald kemur afturat prísinum.
* Gisting í Keypmannahavn ikki íroknað.

Atlantic Airways
- setir Føroyar í miðdeplin
Tel 333 900 · www.atlanticairways.fo

SANSIR TEL 355355